# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lættur at bera

Lærdómur er lættur at bera, søgdu teir gomlu. Hesi orð munnu mong ung og yngri sanna í hesum árum, har eftirspurningurin eftir fólki við handaligum ella bókligum útbúgvingum er størri enn nakrantíð. Skúlaárið er nú endað og hundraðtals ung við góðum miðnamsútbúgvingum eru farin út í lívið og vónandi fara tey flestu undir einahvørja útbúgving. Sum nútímanssamfelagið mennir seg, tykist eftirspurningurin eftir fólki við útbúgving at vera mestsum markleysur. Tey ungu, sum nú fara undir eina hægri ella víðarigangandi útbúgving, kunnu tí gera hetta í tí treysti, at brúk er fyri teimum, tá ið tey um nøkur ár standa við prógvi í hond.

Vit hava her í Føroyum eina røð av góðum og viðkomandi útbúgvingartilboðum. Vit hava Vinnuháskúlan, Handilsskúlarnar, Fróðskaparsetrið og teknisku skúlarnar. Allir lærustovnar bjóða góðar og viðkomandi útbúgvingar á høgum fakligum støði við góðum starvsmøguleikum eftir útbúvingarlok úti sum heima. Tað fer altíð at vera ein spurningur, hvørt tað er skilabest at fara burtur at útbúgva seg ella, at tey ungu vera verandi í heimligum umhvørvi sum longst. Hetta vil oftast vera eitt val hjá tí unga. Í mongum førum hava vit ikki útbúgvingartilboðini í Føroyum, og tá hevur tann ungi einki val, men má fara út í heim. Í hesum førum eru nú sera góðir fíggjarligir møguleikar at leita sær út um ríkisfelagsskapin. Hetta, at ung velja millum ymiskar lærustovnar í ymsum londum uttan fyri ríkisfelagsskapin, hevur stóran týdning fyri tey ungu eins væl og fyri føðilandið, um tey velja at koma heimaftur. Tað hevur stóran týdning fyri samfelagsliga og vinnuliga menning, at komandi ættarlið hava eina fjølbroytta landafrøðiliga útbúgvingarbakgrund. Ísland man vera besta dømi um týdningin av júst einum tílíkum útbúgvingarmynstri.

Tað er eisini nógv, sum talar fyri at taka útbúgving í Føroyum, um viðkomandi útbúgving stendur í boði her. Ein verður verandi í heimligum umhvørvi og allar skipanir eru smáar og lættar at yvirskoða og handfara. Hartil eru kanska ikki so stórar forðingar, sum uttanlanda, eitt nú við upptøkuavmarkingum v.m. Okkurt kundi bent á, at tað er skilagott og gagnligt fyri allar partar, at ein, sum t.d. velur hægri lesnað í Føroyum, eisini tekur partar av útbúgvingini uttanlanda. Í slíkum førum hava tey ungu nógvar valmøguleikar og gott fíggjarligt og fakligt útgangsstøði. Samantikið má ásannast, at útbúgvingarmøguleikarnir eru bæði nógvir, góðir og áhugaverdir. Tað er bert at halda á fjørðin og nýta teir møguleikar og taka tær avbjóðingar, sum ein altjóðagjørdur heimur nú á døgum hevur at bjóða ungum undir útbúgving. Lærdómur er lættur at bera, eitt nú, tí hann gevur valmøguleikar og valmøguleikar er eitt av tíðarinnar mongu loysunarorðum.

**Sosialurin**

# Politikarar spilla málið

**Í summarbrævi frá Málnevndini verða summir politikarar hartaðir fyri málspillur, gøtumaður róstur fyri at læra fólk at frambera navnið hjá fótbóltsfelag rætt og nakrar málsligar leiðbeiningar frambornar**

MÁLNEVNDARBRÆV
*Málnevndin*

**Niðanfyri prenta vit summarbrævið frá Málnevndini:**
Fram, víkingur! Tað var gleðiligt at síggja ítróttafrásøgufólk í sjónvarpinum herfyri lurta eftir gøtumanni, sum greiddi frá, at tað eitur víkingur og ikki vikkingur, sum hevur verið at hoyra víða hvar í eina tíð. Nú hoyrist tann rætti framburðurin oftari og oftari.

### Politikaramálspillur

Tey flestu gera sær ómak við at málbera seg væl, tá ið tey eru í loftmiðlunum, og góður málburður verður treytaleyst kravdur av teimum, sum starvast í almennum loftmiðlum. Flest teirra lúka krøvini í øllum góðum.

Tey, sum eru gestir í útvarpi ella sjónvarpi í samrøðum e.a.tíl., eru ikki undir sama kravi. Men her eru politikarar í einari serligari støðu, so nógv pláss sum teir fáa í almennu miðlunum; harumframt hava teir sum vald umboð hjá okkum øllum serliga skyldu at vanda sær um málið. Landsins kosnu hava yvirhøvur vandaðan málburð, summi framúr, so tað er ein frøi at lurta eftir teimum.

Tó, málspillur lýta. Vanligt men ófagurt politikaramál er orðingin upp á núverandi tíðspunkt. Tað rætta er t.d. sum (nú) er ella í løtuni – umframt at tað er styttri og snøggari. At tað er skjótari at siga, er ikki altíð ein fyrimunur hjá politikarum, tí teir vinna sær ofta tíð við ífylluorðum sum teimum omanfyri nevndu, men mælt verður frá hesari orðingini, og væl ber til at finna onnur løtt ífylluorð.

Utilukkandi tykist at vera ein málspilla, sum er blivin mótstøðufør, so ofta hoyra vit hana frá politikaranum, t.d. "Tað kemur útilukkandi at snúgva seg um...", hóast tað hevði verið so lætt at sagt "Tað fer burturav at snúgva seg um... ."

Orðið kaoskontol var herfyri dagligur gestur í føroyskum stovum, eitt ósnøgt mótaorð, sum tað ber til at finna upp í ein leyp av føroyskum orðingum fyri, t.d. tíðin, sum átti at farið til politiskt virksemi, fer bara til at sløkkja eldar, ...at slætta sjógv, at verja seg fyri brotasjógvum, halda pláss o.a.m..

### Umsorgan og vansorgan

Nógv og væl er skrivað og tosað um almannamál. Eitt høvuðsorð á økinum er umsorgan, sum er eitt gott orð um tað at røkta og fjálga um, bæði í dagligum máli og yrkismáli. Har, sum umsorgan ikki er til staðar, men átti at verið, er talan um vansorgan, t.e., van- verður sett frammanfyri (sbr. t.d. vanrøkt, vanvirðing o.fl.), og um- fellur tá burtur. Hetta er eisini eitt gott orð.

Vit hava sæð og hoyrt orðið vansorgan í bløðum og loftmiðlum. Men nú sýnist tað at vera burturblivið; í staðin er komin ein miseydnað týðing av tí danska omsorgssvigt, sonevnt umsorganarsvik. Á donskum eitur tað strømsvigt, tá ið streymurin fer og vit liggja í streymloysi; men neyvan høvdu bløð og loftmiðlar funnið upp á at kalla tað streymsvik, sum – um tað verður brúkt – merkir at svika, kanska stjala streym. Orðið umsorganarsvik er burtur av allari leið, men vansorgan er snøgt og greitt.

### Apoteksmál

Á einum kunnningarlepa, sum fylgdi við einum pakka av tablettum frá apotekinum stóð: "Takast til matin." Ikki er hetta trivaligt mál, men eyðsæð ein donsk orðing, samsvarandi t.d. at spise brød til kaffen. Vit eta breyð aftur við kaffinum, og tablettirnar skulu takast aftur við mati.

### Sjónvarpsteksting

Tað er álvarsmál, at teksturin á skíggjanum hjá SVF ofta er skeivt skrivaður. Álvarsmál, tí landið rindar nógvan pening fyri at læra børnini at stava. Tað er sjálvsagt, at Sjónvarp Føroya í hesum eigur at draga somu línu sum skúlin og má skriva rætt á skíggjan. Tí harmast vit um, at nøvn á kappróðrarbátum vóru skeivt stavað á skíggjanum stutt herfyri.

### Málnevndini sita:

Turið Sigurðardóttir, lektari, Tórshavn, er formaður og umboðar Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetri Føroya

Erling Isholm, studentaskúlalærari, Tórshavn, er næstformaður og umboðar Móðurmálslærarafelagið

Ann Ellefsen, studentaskúlalærari, Tórshavn, umboðar Mentamálaráðið

Randi Jacobsen, blaðkvinna, Klaksvík, umboðar Blaðmannafelagið

Heðin M. Klein, lærari, Tórshavn, umboðar Rithøvundafelagið.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.